# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Jákup Petur Juul, Fuglafjørður**, andaðist týskvøldið, 26 ára gamal. Tey, ið vilja minnast Jákup Petur, kunnu lata eina gávu á konto hjá børnunum í Føroya Banka. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Judith Henriksen úr Sandavági**, ættað úr gomlustovu í Sumba, andaðist á Ellisheiminum í Vágum týsdagin 12. septmeber, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður av Ellisheiminum leygardagin kl. 13 í Sandavágs kikjugarð.

Jarðarferðin hjá lítla **Petur Paula Johansen, Strendur**, verður úr Sjóvar kirkju fríggjadagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast lítla Petur Paula, kunnu lata eina peningagávu til barnadeildina á Landssjúkrahúsinum. Konto í Sparikassanum.

## Minningarorð um elskaðu mammu mína
## Randi Kristensen
**f. 11.02.49 d. 12.03.06**



Góða mamma, ikki vardi tað meg, at tað var síðstu ferð, eg skuldi hoyra tína mjúku rødd, tá eg segði farvæl við teg leygarkvøldið. Tá ið pappa ringdi kl. 02.00 sunnunátt, góðar 2½ tíma eftir, at eg hevði sagt tær góða nátt, helt eg at tað var ein óndur dreymur, men so var ikki. Eftir stutta sjúkralegu vóru boð eftir tær at koma heim til Harran.

Góða mamma, lívið hevur ikki verið blítt við teg. Tú vaks upp heima á Sandi, har tú vart yngst av 5 systkum. Tú giftist við pabba í 1970, og fingu tit 4 børn.

Sum heilt ung genta rakti sorgin teg á fyrsta sinni, tá 19 ára gamli bróðir tín gekk burtur við "Stella Argus". Bert 28 ára gomul misti tú mammu tína, og 5 ár seinni í 1982, rakti sorgin aftur teg og pabba, tá sonur tykkara, Kitti, doyði av vanlukku bert 6 ára gamal. Tað var ein sorg, sum tú ongantíð komst yvir, men tú lærdi teg sjálvan og ikki minst okkum onnur at liva við sorgini.

Í 1986 og 1992 rakti sorgin aftur, tá tú misti tveir brøðir. Men sjálvt um lagnan var hørð við teg, so vart tú altíð tann fyrsta, sum gleddist við okkum, tá tað gekk gott. Altíð vart tú har fyri okkum, og ommubørnini vóru altíð fyrst í tonkunum hjá tær. Ommubørnini elskaðu at fara í "Ommugarð".

Men tín styrki kom veruliga til sjóndar, tá yngsti ommusonurin fekk staðfest blóðkrabba. Meðan foreldrini vóru í Danmark við honum, tóku tú og pabba tykkum av hinum soninum, eisini gjørdu tit heimið klárt, tá tey eitt ár seinni komu heimaftur.

Tá tú fekst boðini um, at tú hevði fingið hesa hervuligu sjúku, helt eg at verðin fór at detta saman, men eisini her vísti tað seg, at tú og pabba høvdu meira styrkju enn nógv av okkum. Tað vórðu tit, sum góvu okkum trúnna upp á, at hetta nokk skuldi ganga.

Hetta síðsta árið hevur verið hart, men vit høvdu nógvar góðar løtur saman. Vit hildu øll jól saman, og tá hevði tú tað so gott. Og í februar, tá tú hevði føðingardag, vart tú so væl fyri. Tú hevði trúnna uppá, at tú fór at vinna á sjúkuni. Tú segði so ofta " Tá eg verði frísk".

Men størsta gleðin hjá tær var í januar, tá tað bleiv staðfest, at ommusonurin var frískur, og tað eri eg sera glað fyri, at tú kundi uppliva.

Góða mamma, ja nú ert tú heima hjá øllum teimum, sum tú saknaði. Vit vita, at tú hevur tað gott har, men saknurin eftir teg er so ómetaliga stórur. Men vit vita, at ein dag so síggjast vit aftur.

Hvíl í friði góða mamma og takk fyri alt.

**Kristin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góði pápi, verpápi og abbi okkara

**Robert Poulsen**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Sonju Klein fyri troystarrík og vøkur orð.
Takk fyri vitjan og til tykkum, sum ringdu.
Takk til heimasjúkrasystrarnar, starvsfólkini á B6 og á Hotel Tórshavn.
Takk til Dubultkvartettina fyri tann vakra sangin í kirkjuni.
Takk til kirkjutænara, berarar og gravarar og takk øll tit, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri kransar, blómur og gávur til Føroya Felag Móti Krabbameini.
Og takk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*

**Annika, Beinta og Andras**

# Emil Jacobsen 70 ár



Hósdagin 14. september verður Emil Jacobsen í Leirvík 70 ár.

Emil er ættaður úr Leirvík, foreldrini vóru Thomasia, úr Geilini í Leirvík, og Jákup Absalon, ættaður av Viðareiði, men vaks upp í Leirvík.

Tey fingu 7 børn: Petur Adrian, sum býr í Leirvík, Dalborg, sum býr í Klaksvík, Elsa, sum býr á Glyvrum, Olbana, sum býr í Leirvík, Tummas, sáli, sum búði í Leirvík, Martin, sum býr á Sandi, og Emil sum býr í Leirvík.

Emil fór til skips í 1953. Hann sigldi nógv við norskum línubátum, men størsta partin av tíðini hevur hann verið útróðrarmaður, og tað er hann framvegis. Tað ið hevur sermerkt Emil er trúfesti. Hann er ein álitismaður, ein av teimum ið hevur myndað bygdina. Tað kann av røttum sigast, at Emil er ein kempa.

Emil giftist Eilu, ið var ættað av Mýrini á Toftanesi í Leirvík. Tey bygdu sær hús á Gadd og fluttu inn í 1960. Børnini hjá teimum eru: Jóan Petur, sum býr í Leirvík, Dánial, sum býr í Oyndarfirði, Turid, sum býr á Toftum, og Jákup Andreas, sum býr í Leirvík.

Fyri góðum ári síðani gjørdist Eila illa sjúk og doyði í mai mánað í ár, 68 ára gomul.

Hetta tók fast hjá Emil, sum var heima hjá konuni alla tíðina, meðan hon lá sjúk.

Nú er tómligt í heiminum á Gadd, men børnini og ikki minst tey 10 abbabørnini vitja dúgliga.

Vit eru mong sum ynskja Emil hjartaliga tillukku við føðingardegnum, sum hann heldur saman við børnunum.

**Ó.**

**Dagurin í morgin**

**30. november. Andrasarmessa.** Um lærusveinin Andrias sigur apokrýfisk søgn, at hann, tá ið ápostlarnir skiltust, fór sum trúboðari til Grikkalands og um svartahavsleiðirnar. Hann noktaði fyri at tæna skurðgudunum og varð krossfestur. Krossurin hann var hongdur á, var settur saman á skák, og ein tílíkur krossur hevur síðani verið róptur andrasarkrossur.

Á kirkjubøstólunum við træskurðinum av Andrasi er hann avmyndaður við hesum krossi. Andras hevur verið høgt mettur sum halgimenni t.d. í Russlandi og Skotlandi, og vit vita, at minningardagur hansara, 30. november, eisini hevur verið hildin í Føroyum. Navnið er grikst og merkir maður.

# Kappingarkvøld í Margarinfabrikkini



Fríggjakvøldið frá kl. 19-22 verður Føroya feitasta kappingarkvøld í Margarinfabrikkini í Havn.

Nógvar kappingar verða á skránni, m.a Raven Shields teldu-kapping, borðtennis-kapping, borðfótbólts-kapping, pool- kapping,og airhockey-kapping. Eisini verður super- góður tónleikur at hoyra alt kvøldið. Í kioskini verður møguleiki at keypa neon-lutir og ymiskt góðgæti.

Kappingarkvøldini í Margarinfabrikkin er eitt sera vælumtókt tiltak, har kappingarnar broyta innihald frá ferð til ferð, so at møguleikar eru fyri at hava so nógvar og ymiskar kappingar sum gjørligt.

Aldursmarkið til kappingarkvøldini er 9-13 ár. Atgongumerki á 30 kr (fyri ikki-limir) og 20 kr fyri limir verður keypt við dyrnar.

Nærri fæst at vita um kappingarkvøldið við at ringja í Margarinfabrikkina tlf 302119.